VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði, um kvøldið veksur hann vindin til skrið. Kavaælingur og hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig – hósnáttina niður í ÷6 stig.



Veðrið hósdagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av norði og kavaælingur. Um kvøldið minkar hann vindin niður í andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og klárt. Hitalagið millum ÷4 og ÷7 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fyrrapartin lot av ymsum ætttum, turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri og avfall, partvís sum vátakavi ella regn. Hitin um 3 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og útsynningi og ælingur, mestsum kavi og hitin millum frostmarkið og ÷4 stig.

Gerðabókin handað Sámal Tróndi

Leygardagin læt upp forkunnug framsýning í Listaskálanum í Havn við verkum eftir fleiri av okkara gomlu málarum saman við samtíðarlist. Í hesum sambandi varð gamla gerðabókin hjá Føroya Listasavni handað Landsskjalasavninum í varðveitslu

Ein, ið kann kallast »The Grand Old Man« í føroyskari list, er Janus Kamban, hvørs virksemi eisini er sjónligt í gerðabókini. Her prátar hann við Jens Frederiksen
Mynd: Finnur Justinussen

HANDAN LISTINA
Theodor E. D. Olsen

Í sambandi við framsýningina »Goymt – ikki gloymt« hittust tveir nýggir leiðarar í Listaskálanum í Havn leygardagin. Jens Frederiksen, nýggjur leiðari í Listaskálanum, handaði tí nýsetta landsskjalavørðinum, Sámali Tróndi Johansen, gerðarbókina hjá Føroya listasavni, so hon framyvir kann varðveitast á Landsskjalasavninum.

Higartil hevur hon tó ligið væl í einum brandtryggum skapi í Listaskálanum, men Jens Frederiksen helt tað vera betri at lata Landsskjalasavninum hana í varðveitslu.

Formelt varð handanin undirskrivað í gjár, men longu leygardagin varð hetta markerað. Sámal Tróndur Johansen takkaði fyri og heitti á onnur, sum eisini eiga gomul skjøl, um somuleiðis at lata tey inn til Landsskjalasavnið.

Gerðabókin byrjar í 1948 og fyrsta frágreiðingin er skrivað av Williami Heinesen, men eisini menn sum Janus Kamban eiga sín fitta part í tí virksemi, sum er endurgivið og varðveitt í gerðabókini. Síðsta fundarfrásøgin varð skrivað í december 2002, og gerðabókin er longu farin undir elektroniska viðferð.

Elsta handritið, sum liggur á Landsskjalasavninum er Kongsbókin við Seyðabrævinum, sum er frá endanum av 13. øld, men umframt at hava almenn skjøl hevur Landsskjalasavnið eisini bøkur og skjøl frá ymiskum fyritøkum í Føroyum.

Fortíð og samtíð

Framsýningin »Goymt – ikki gloymt«, sum er opin til og við 16. februar, vísir ókend verk frá goymsluni av m.fl. J. S Mikines, Ruth Smith, Hans Hansen, men eisini samtíðarlistin er umboðað.

Sýningin er fyrsta roynd at gera vart við, at Listasavn Føroya er partur av føroyska savnskervinum og m. a. fæst við at skráseta og varðveita okkara myndlist.

Í samband við at digitala skrásetingin á savninum er um at vera liðug, var hildið, at ein framsýning av minni kendum verkum kundi verið við til at seta tað støðugu framsýningina í eina nýggja frásjón – samstundis sum tað er ein hóskandi yvirgongd til Várframsýningina, sum er næst á skránni, og har tað nýggjasta innan listina sær dagsins ljós.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷10
Nuuk	–
Qaqortoq	÷4
Ammassalik	÷3
Saint John's	1
Halifax	2
Reykjavík	3
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	5
Lerwick	7
Aberdeen	12
London	13
Tromsø	÷4
Bergen	7
Oslo	–
Stokkhólm	0
Keypmannah.	9
Helsinki	÷8
Moskva	0
Berlin	7
Warzawa	3
Kiev	0
Bukarest	0
Paris	13
Madrid	19
Róm	–
Malorca	11
Athen	8
Malta	12
Tunis	13
Beijing	÷2
New Dehli	16
Bangkok	30
Jakarta	30
Sydney	–
New York	÷8
Miami	15
Los Angeles	22
Meksikobýur	–
Panama	–
La Paz	12
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	32

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt lágtrýst, 984 hPa skamt eystan fyri Føroyar fer í landsynning og grynnist.



Millum lágtrýstið við Lofoten og eitt hátrýst yvir Grønlandið rekur køld luft av norði móti Føroyum. Hátrýstið vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur haðani til Íslands verður væntandi yvir Føroyum fríggjanáttina.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 27/01 kl. 06⁰⁰– 28/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,8°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

AVFALLIÐ



Avfallið: 6,0 mm – mált frá 27/01 kl. 06⁰⁰–28/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 199,9 mm

VESTFALLSKYRRINDI

23. jan.: Mánin næstur jørðini
25. jan.: Seinna kvarter
1. febr.: Tendring
7. febr.: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar/Vágafirði fp.	Suðuroyar/Vágafirði sp.	Skúvoyar/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
29. jan	03.52	16.20	02.52	15.20	03.07	15.35	05.52	18.20	06.52	19.20	02.07	14.35	01.07	13.35	04.07	16.35	05.07	17.35	03.37	16.05	04.52	17.20
30. jan	04.48	17.17	03.48	16.17	04.03	16.32	06.48	19.17	07.48	20.17	03.03	15.32	02.03	14.32	05.03	17.32	06.03	18.32	04.33	17.02	05.48	18.17
31. jan	05.44	18.22	04.44	17.22	04.59	17.37	07.44	20.22	08.44	21.22	03.59	16.37	02.59	15.37	05.59	18.37	06.59	19.37	05.29	18.07	06.44	19.22
1. feb	06.38	19.04	05.38	18.04	05.53	18.19	08.38	21.04	09.38	22.04	04.53	17.19	03.53	16.19	06.53	19.37	07.53	20.19	06.23	18.49	07.38	20.04

5 707265 100036 >